VALGREINAR

# Fiskidagaskipanin fyri smábátar eigur at avtakast!

**Thomas Arabo**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Kvotaskipan undir Føroyum riggaði ikki. Fiskidagaskipanin sær út til at rigga hampuligani væl .Um hon verjur fiskastovnarnar nakað serliga væl, eru menn eitt sindur ymiskir á máli um. Eitt er tó breið semja um, og tað er, at tann umfatandi friðingarskipanin, íð var gjørd í 93/94, hevur riggað óføra væl.

**Fiskiveiðulógin endurskoðast.**
Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur nú virkað í 8 ár og er broytt óteljandi ferðir. Vit kunnu í dag konstatera at fiskivinnan í hesum tíðarskeiði er samlað á fáar hendur, og rættindir til tilfeingið, sum eru fingin ókeypis frá Landsstýrinum, standa til sølu í bløðunum fyri nógvar pengar. Hettar var ongantíð meiningin við lógini. So fløkjaslig sum lógin er blivin, eigur hon at verða endurskoðað sum skjótast.

**Smábátar út úr fiskidagaskipanini.**
Javnaðarflokkurin hevur á landsfundi samtykt, at fiskidagaskipanin fyri bátar undir 15 tons eigur at avtakast, og at bert friðingarskipanirnar eiga at galda fyri hesa bátastødd. Bátastøddin hevur náttúrligar avmarkingar frá skaparans hond og oyður undir hesum treytum ongar fiskastovnar.

Ein atkvøða fyri Javnaðarflokkinum kann hjálpa tær at røkka hetta mál.

Hav tað í huga 30 apríl!

# Loysing / samband

**Niklái Petersen**
*valevni tjóðveldisfloksins í Norðurstreymi*



Tað komandi løgtingsvalið hevur alstóran týdning fyri sjálvstýrisvongin í føroyskum politikki. Valið fer í høvusheitinum at standa ímillum sjálvstýrisvongin og heimastýrisflokkarnar, tað er ongin ivi um tað.

Fyri 8 árum síðani til løgtingsvalið í 1994 settust heimastýrisflokkarnir við árarnar. Í stýriborð sótu Sambandsflokkurin og Gamla Sjálvstýrið, og í bagborð Javnaðarflokkurin og Verkamannafylkingin.

Sum øllum kunnugt róðu teir bert hálvt málið, so løgdu javnaðarmenninir árarnar inn, teir vóru pøstir - orkaðu ikki meir.

Verkamannafylkingin kundi sum vera man ikki einast um nakað sum helst, tí har vóru ov nógvir høvuðkambar, og tey løgdu eisini árarnar inn.

Í stýriborð sótu so hinir og róðu einsamallir, báturin kom sum vituligt ikki úr stað, men mól bert í klingur, og púrt onki kom av skafti. Hetta hevur verið eyðkennið fyri hesar flokkar.

Tað eru nú eini øgilig rin og hvin at hoyra frá einum stórum parti av hesum flokkum, nú nakað veruliga er hent í samfelagnum, hetta er allarhelst púra ókent í teirra verð, at vit veruliga kunna nakað sjálvi.

Hvussu í allari víðastu verð kunnu tit borga fyri trygd???

Tjóðveldisflokkur saman við restini av samgonguni róði alt málið, hóast tað breyt í bæði borð og nógv stóð á.

Tjóðveldisflokkurin vísti ábyrgd og rygg, tá á stóð.

Veljið tí ein sterkan tjóðveldisflokk á ting X við E.

# Sjálvberandi búskapur fyri at kunna veita hjálp og umsorgan

**Roar Heini Olsen**
*valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy*



Í komandi valskeiði vilja vit í Sjálvstýrisflokkinum eggja hinum flokkunum til, at ideologi og klandur um Ríkisfelagsskap mótvegis Fullveldi verður lagt til viks, so at politikkarar og Landsstýri kunnu røkja sína fremstu skyldu: at lata tørvin hjá tí einstaka borgaranum og hjá heildini av borgarum vera avgerandi fyri, hvussu týðandi samfelagstrupulleikar verða raðfestir og loystir, at uppbyggja eitt sjálvberandi vinnulív, sum ikki lutvíst er almannaklientur men er ført fyri at gjalda fyri ta vælferð, allir borgarar vænta at fáa lut í og fyri ta hjálp, sum serliga tey, ið ikki klára seg sjálvi, hava krav uppá.

Tann fallni, antin hann frá barnsburði ella vegna sjúku, óhappi ella aðrar orsakir er heilt ella lutvíst óhjálpin, hevur ikki bert tørv á hjálp og umsorgan. Tørvurin, neyðin, hjálparloysið og vónin og forvæntingin um at fáa eina hjálpandi hond og umsorgan frá tí einstaka eins væl og frá felagsskapinum av einstaklingum, sum samfelagið jú er, er meira enn ein tørvur, sum skal nøktast, um ráðini eru til tess.

Eins og ein druknandi, ið rættir sína hond upp ímóti teimum, sum sita trygg í bjargingarbátinum, er tørvurin og forvæntingin um hjálp ein etisk avbjóðing - eitt etiskt krav til hvønn einstakan av okkum eins og til samfelagið - felagsskapin. Tað er júst tá ið vit eru hjálparsleys og allarmest sárbar, at samfelagið - tað at vit standa saman um hvønn annan - hevur stórst týdning. Tá fánar alt annað burtur, sum kann vera mikið gott og sum tað til dagligt tykist at hava týdning, at tað almenna stuðlar.

Sjálvandi skulu vit hugsa um alt annað eisini, eisini tey frísku og sjálvhjálpnu, men hjálpin til og umsorganin fyri teimum, sum hava hjálp og umsorgan fyri neyðini, má og skal ikki svíkja og eigur at liggja okkum fremst í huga.

# Einlig eisini rætt til bústað fyri ein sámuligan kostnað

**Eyðólv Dimon**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin sigur í valskránni "Fólkið Fyrst", at øll hava rætt til ein bústað fyri ein sámuligan kostnað. Hetta líkist als ikki gerandisdegnum í Tórshavn og langt burtur frá tí. Sethúsaprísirnir eru fyri langari tíð síðani farnir upp um tað, teir vóru í 80´unum og at royna at finna sær ein leigubústað er vónleyst. Borgarligu politikkararnir síggja tað ikki sum sína uppgávu at loysa henda trupulleika. Teirra uppskot er at geva útleigarum skattafrían ágóða av leiguinntøkuni, og so siga teir, at leigan fer at lækka av sær sjálvari, og útboðið av íbúðum fer at økjast. Men vit minnast, tá tollurin varð avloystur av MVG-skipanini. Hetta gjørdi tað bíligari hjá timburhandl unum at innflyta byggitilfar, og tí átti kostnaðurin av byggitilfarið at lækka samsvarandi, men tey einastu, sum ongantíð merktu eina lækking í kostnað inum, vóru vit, sum bygdu um hetta mundi.

**Fastognarprísurin hækkaður 50%**
At tað er vónleyst at finna sær eina leiguíbúð ger, at einasta loysn er at byggja ella keypa sær eini sethús. Men sum støðan er, so eru tað færri og færri, sum hava møguleika fyri hesum. Fastognarprísurin er seinastu fýra árini hækkaður við 50%. Skulu fólk byggja egin sethús, so kostar hetta frá 1,5 mió. kr. og uppeftir. Velja tey so ístaðin at keypa eini hús, so kostar hetta í høvuðsstaðarøkinum einastaðni millum 1,5 til 2 mio. kr.. Tórshavn er tí við at gerast ein býur, har einligir forsyrgjarar, lág- og partar av miðalløntum ikki hava ráð at búseta seg. Javnaðarflokkurin ásannar, at henda støðan kann ikki sleppa at halda fram.

**Fakfeløgini sinnað at byggja íbúðir**
Okkara uppskot er tí, at umstøður mugu skapast, so Húsalánsgrunnurin, pensjónsgrunnar, kommunur, fakfeløg og onnur, sum hava áhuga í eini langtíðaríløgu í leiguíbúðir, fáa loyvi at gera íbúðarfeløg. Føroyska fakfelagsrørðslan hevur fleiri ferð gjørt vart við, at hon er sinnað at fara undir íbúðarbygging heldur enn at seta peningin hjá limum sínum í útlendsk virðisbrøv. Men ein treyt er sjálvandi, at íbúðarfeløgini fáa sama rætt til almennan stuðul, sum tey, sum byggja privat sethús, fáa. Hetta merkir, at tey fáa rentustuðul, og harafturat at tey fáa endurrindað MVG útreiðslurnar.

**Miðalstór leiguíbúð fyri 3200 krónur um mánaðin**
Við uppskotinum gerast eisini fleiri møguleikar hjá teimum, sum vilja búgva í egnari eigaraíbúð. Møguleiki verður at búgva í minni og bíligari íbúðareindum, so fólk ikki longur standa í valinum millum at byggja hús fyri 1,5 milliónir ella als onki at eiga. Fær Javnaðarflokkurin møguleikar at seta hetta í verk, so verða nógvir trupulleikar á íbúðarøkinum loystir. Nøkur dømi eru

- at samlaða útboðið av eigara- og leiguíbúðum økist, og tað hevur við sær, at sethúsaprísirnir gerast normalir.
- at eldri fáa møguleika at selja egin hús og flyta í minni íbúðir.
- at tilboðið av miðalstórum íbúðum, t.v.s. einar 80 fermetrar økist. Hetta gevur ungum møguleika at keypa sítt egna, og soleiðis byrja uppsparingina til tey møguliga seinni hava tørv á størri bústaði. Tí tá kunnu tey brúka frívirðið sum eginpening í nýggju húsunum. Hetta frívirðið er eftir 10 árum blivið góð hálv millión.

Útrokningar vísa at hesar íbúðir kunnu byggjast fyri einar 800 túsund krónur. Hetta merkir so aftur, at útreiðslurnar fyri keyparan koma at verða einastaðni millum 5-6000 kr. um mánaðin. Ynskja fólk haldur at leiga, kann hetta gerast fyri 3200 kr. um mánaðin.

Tú hevur møguleikan at gera títt fyri, at hetta skal gerast veruleiki við at seta krossin fyri Javnaðarflokkinum týsdagin 30. apríl.



VIÐMERKINGAR

# Skammilig viðferð av statsmanni

**Óli Jacobsen**



Í næstseinastu viku kom Thorvald Stoltenberg eftir, at tað í føroyskum fjølmiðlum høvdu verið borin, stórt uppsligin, tey tíðindi, at hann skuldi standa fyri ein kanning hjá NA-bólkinum í Fólkatinginum m.a. av, hvussu nógv Danmark hevði forvunnið burtur úr NATO støðunum í Grønlandi og Føroyum.

Tá hann als ikki hevði átikið sær ein slíka uppgávu, hevði hann sjálvsagt áhuga fyri at hesi tíðindi vórðu rættaði í Føroyum. Hetta gjørdi hann við í stuttum at greiða okkum sum hava tosað við hann frá, at hann hevði játtað Lars Emil Johansen at vera ráðgevi í uttanríkis- og trygdarmálum. Men tá hann so kom eftir, hvør uppgáva var ætlað honum tók hann seg aftur. Tí er hann als ikki við í nakrari kanning. Men hesi tíðindini um, at hann hevði tikið seg aftur, vóru ikki send fjølmiðlunum av NA-bólkinum.

Tá hetta kemur fram sendir NA-bólkurin út tíðindaskriv, sum sjálvtsagt verður endurgivið sum ætlað av "hansara" tíðindatænastu í Føroyum. Men við hesum skjølum er bólkurin komin at lýsa sína egnu arbeiðsgongd.

Eftir øllum at døma hevur verið bæði munnligt og skrivligt samskifti við Stoltenberg. Men um tað bert verður gingið eftir upplýsingum hjá NA-bólkinum sjálvum hevur gongdin verið henda:

**Gongdin í málinum.**

1. Tann 28.februar verður sent bræv til Thorvald Stoltenberg, sum skal "betragtes som en forsigtig føler" áðrenn send verður honum "en officiel henvendelse" saman við ætlaða arbeiðssetninginum hjá ætlaða bólkinum.
2. Tað einasta sum stendur í hesum brævi um arbeiðssetningin er, at hann "omhandler blandt andet belysning af vores landes udenrigs- og sikkerhedspolitiske forhold.." Tað er óneyðugt at siga, at hetta er eitt øki, sum kann umfata ein hóp av evnum. Ikki minst hjá einum fyrrverandi uttanríkis- og verjumálaráðráðharra.
3. TS vísir sína stóru vælvild at játta henda "følaran". Og samb. umrødda brævi frá NA-bólkinum skuldi næsta stigið verið, at hann fær eina almenna umbøn saman við uppskot til ein arbeiðssetning. Og tað skuldi annars verið ein sjálvfylgja, at arbeiðssetningurin verður gjørdur í samráð við tí ætlaða formannin í bólkinum. Men hetta verður ikki gjørt!
4. Í staðin verður ein arbeiðssetningur sendur fjølmiðlunum, sum einki hevur við uttanríkispolitikk at gera, og sum stórt sæð bert snýr seg um ein verjupolitiskan spurning, nevniliga hvat danir hava fingið fíggjarliga burtur úr NATO í Føroyum og Grønlandi. Og hesin útgreinaði arbeiðssetningur verður sendur fjølmiðlunum uttan um TS, hóast hetta kundi verið gjørt eftir eini løtu við nútíðartøkni. Meðan "arbeiðssetningurin" í brævinum til Stoltenberg telur eina reglu, so fyllir tann útgreinaði arbeiðssetningurin meira enn eina síðu.
5. Grundað á hesi tíðindi sláa føroysku fjølmiðlarnir stórt upp og útgreina í smálutir, at nú skal Stoltenberg skera ígjøgnum mótvegis Danmark í hesum eldfima máli. Hetta verður gjørt, uttan at Stoltenberg kennir og enn minni hevur góðkent at arbeiða eftir hesum arbeiðssetningi, og uttan at hann verður spurdur av fjølmiðlunum um hansara leiklut.
6. Tá Stoltenberg ger vart við, at hann als ikki er við í hesum arbeiði, fer NA-bólkurin saman við "sínum fjølmiðlum" í gongd at sáa iva um trúvirðið hjá Stoltenberg. NA-bólkurin sendir út eitt tíðindaskriv, sum er grundað á, at Stoltenberg samb. Sosialinum ongantíð hevur játtað at vera við til at kanna uttanríkis- og hernaðarpolitisk viðurskifti hjá Grønlandi og Føroyum. Hóast tað stendur heilt greitt í samrøðuni, at hann júst hevur givið eina generella tilsøgn í hesum spurningi. Út frá hesi "heimagjørdu" fyritreyt verður "skjalprógvað", at TS hevur sagt ósatt, hóast skjølini frá NA bólkinum júst prógva, at hann ikki hevur játtað at vera við í teirri útgreinaðu kanning, sum talan er um. Og henda "úleggingin", sum stríðir beint ímóti veruleikanum, verður rátt endurgivin í fjølmiðlunum. Ikki minst í tí "óhefta" útvarpinum. Nú er tað Stoltenberg, sum er "skurkurin", og sum hevur villleitt føroyingar!
7. Samstundis verður váttað av Lars Emil Johansen, at Stoltenberg hevur tikið seg aftur, og hetta hevur hann eisini kunnað um í grønlendskum fjølmiðlum. Og at tað skal vera eitt "mistak", at føroysku fjølmiðlarnir ikki eru kunnaðir! Men umrødda tíðindaskriv sleppur sær behendiga undan at geva nakra sum helst frágreiðing um hetta "mistak".

**Tveir avgerandi spurningar:**

8. Hetta førir til tveir avgerandi spurningar. Tann fyrri: Hvussu ber tað til, at henda kunning um, at Thorvald Stoltenberg kortini ikki er í bólkinum, ikki er farin til føroysku fjølmiðlarnar? Henda nærliggjandi spurning hava 3 av 4 fjølmiðlum ikki sett avvarðandi fólkatingsmanni. Tíðindaskrivið frá NA bólkinum í hesum máli gevur onga ábending um henda heilt avgerandi spurningin. Serliga má hetta undra, tá hugsað verður um, hvussu væl tað annars verður kunnað um virksemið hjá bólkinum.
9. Hin seinni spurningurin: Hvussu kann tað bera til, at føroysku fjølmiðlarnir á so tunnum grundarlag kunnu spinna eina søgu, som hevur so lítið við verunleikan at gera? Og sum als ikki hevði verið avdúkað, um tað bert stóð upp til hesar fjølmiðlar! Hetta má seta ein sera stóran spurning við trúvirðið hjá føroysku tíðindatænastuni. Í hvussu er til tann partin sum aktivt medvirkar til at grugga málið sum greitt frá.

**Fallin í ránsmannahendur.**
Thorvald Stoltenberg er ikki hvør sum helst. Hann man vera ein tann fremsti norðurlendski politikkarin á heimspolitiska leikpartinum. Tann sum vil vita meira um Stoltenberg kann í seinasta FF-blaðnum lesa eitt norskt ummæli av hansara sjálvsævisøgu "Det handler om mennesker".

Tað skuldi verið eitt kvett hjá einum og hvørjum politiskum bólki at fáa lyfti um ráðgeving frá einum slíkum manni. Tí sovæl uttanríkis- sum verjuviðurskifti eru spennandi øki hjá tí, sum hevur áhuga fyri tí.

Men tað sum NA bólkurin so ger er at draga mannin uppá tráð. Eftir at hann hevur víst játtað at vera við, setir NA-bólkurin saman ein arbeiðssetning, sum skal nýtast politisk móti Danmark í einum av teimum mest eldfimu politisku evnunum yvirhøvur. Hetta er serliga galdandi fyri Grønland, men tað er ein longri søga, sum m. a. kann lesast í ævisøguni hjá Hendrik Kaufmann "På kongens bud".

Síðan verður kunngjørt við stórum bókstavum í føroysku fjølmiðlunum, at Stoltenberg skal standa fyri hesi kanning, og nú skal hann seta Danmark uppá pláss í spurninginum, um hvussu nógv Danmark hevur vunnið uppá herstøðir í Grønlandi og Føroyum. Hetta verður gjørt uttan at Stoltenberg veit av hesum.

Tá Stoltenberg so ger vart við, at hann als ikki er við í nakrari slíkari kanning, og at hann hevur gjørt vart við hetta á røttum stað, verður hetta gjørt til, at tað er Stoltenberg, sum villleiðir føroyingar! Tað skal sigast, at grundgevingarnar hjá Stoltenberg fyri ikki at vera við í hesum arbeiði eru so fullkomiliga innlýsandi fyri ein mann í hansara støðu. Hóast hetta verður nú róð uppundir, at maðurin skal hava latið seg ávirka á øðrum í hesum spurningi!

Tað finst neyvan orð fyri ein slíkan atburð. Eitt er, at NA-bólkurin hevur beint fyri sínum egna trúvirði í altjóða spurningum. Men tað at føroyingar kunnu bera seg soleiðis at kemur heilt greitt at skaða møguleikarnar hjá Føroyum framyvir at fáa hjálp frá slíkum serfrøðingum, sum her er talan um.

Tað er ein trupulleiki!

# Einaferð var tað ein politikkari

**... sum ynskti, at allir hinir bóru seg virðiliga at, vóru sakligir og góvu hvørjum øðrum "fair play"**

**Jóannes Eidesgaard**
*formaður Javnaðarfloksins*



Fyri ikki so langari tíð síðan heitti Høgni Hoydal so alfaðirliga á okkum, at vit førdu okkum virðiliga fram í politiska kjakinum og vóru sakligir. Stutt sagt "fair play". Ikki kundi man annað enn vera samdur við honum í hesum. Eg haldi eisini, at løgmaður hevði á leið sama boðskap, tá hann útskrivaði løgtingsvalið.

Í hesum anda vil eg Javnaðarfloksins vegna harmast onkran skeivleika, sum er komin fram í onkrari valgrein hjá onkrum av okkara valevnum, har ikki rættir upplýsingar hava staðið.

Men síðan má eg eisini í sama anda undrast yvir ta lýsingarherferð, sum Tjóðveldisflokkurin hevur í Útvarpinum nú um dagarnar. Lýsingar um m.a.:

- Hvussu hinir flokkarnir ætla at tøma landskassan ?
- Hvussu hinir flokkarnir ætla at geva undirgrundina burtur?

Álvaratos. Eitt er, hvat ein hart sperdur politiskur flokkur kann finna uppá í einum valstríði, men annað er, hvat ein almennur fjølmiðil letur seg brúka til. Tað er ótrúliga langt úti, at slíkt sleppur framat, samstundis sum sami fjølmiðil sendur innkrevjing fyri lurtaragjald út til allar føroyingar, sum eiga eitt útvarp. Eisini teir mongu lurtararnar, sum als ikki finna seg í síkum.

Hetta er demagogiskt, ósakligt og óvirðiligt. Og hetta ger áðurnevndi áheitan frá Høgna Hoydal so staðiliga til skammar.

Kann tað møguliga hugsast, at hinir flokkarnir eisini høvdu fingið lýsingar av líknandi slag við? Lýsingar um m.a.;

- Hvussu Tjóðveldisflokkurin ætlar at forkoma vælferðini?
- Hvussu Tjóðveldisflokkurin ætlar at skipa fullveldið fyri tey sterku og vælbjargaðu?

Men tíbetur hava vit aðrir tikið áheitanirnar frá báðum sitandi løgmonnum til okkara.

Men ein farri av sakligheit hevði verið ynskiligur, eisini tá tað snýr seg um Tjóðveldisflokkin. Góður siður er, at ein ikki krevur meira av øðrum, enn ein sjálvur megnar at liva upp til.

# Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*